## DAGSINS MEINING

# Yvirtøkuhandalag

Tjóðveldisflokkurin hevur júst havt floksting í Hósvík, og var áhugavert at hoyra, hvat flokkurin sigur um støðuna sum heild.

Vit fingu millum annað at vita, at Tjóðveldisfólk var eitt hugsandi fólk. Tað er óviað rætt, men synd er at siga, at seinastu árini hava víst hesi fólk, sum eitt handlandi fólk. Vit skulu langt aftur í søguna fyri at finna lakari valskeið enn tað seinasta, tá tað kemur til yvirtøkur. Gamaní hevur eisini verið soltið, tá Sambandsflokkurin hevur havt Løgmann, men tað er ein erlig søk, tá man alment boðar frá, at man einki ætlar sær á sjálvstýrisleið.

Skipasýnið var yvirtikið í seinasta valskeiði, og tykist handalagið hava verið gott, tá hendan yvirtøkan var framd. Havumhvørvismál vóru eisini yvirtikin av sitandi samgongu, og eigur samgongan rós uppiborið fyr tað. Útyvir omanfyrinevndu yvirtøkur er so at siga einki hent á sjálvstýrisleið. Tað hevur verið tosað nógv, men avrik eru ring at síggja. Yvirtøka av Løgreglu og rættarskipan skal fyrireikast, men ikki fremjast, í hesum valskeiðnum. Fólkakirkjan skal yvirtakast, men her tykist eisini stígur verða komin í.

Fólkakirkjan er eitt gott dømi um, hvussu ein yvirtøka, sum burdi verið ein formalitetsspurningur, kann avsporast av væntandi pragmatismu. Intentiónirnar eru ivaleyst tær allarbestu, men tað gongur eftir øllum at døma sera strilitið.

Tað er bláoygt at fyrigykla sær, at ein full semja fæst millum prestar, fríkirkjufólk og politikarar, áðrenn nøkur yvirtøka verður framd. Tað frægasta er, at yvirtaka fyrst i verandi líki og koyra statsins part av gjaldinum á fíggjarlógina. Síðani kann ein arbeiðsbókur setast, ið kann umrøða framtíðar fólkakirkjuna. Tá hevði ein ósemja ikki forðað fyri sjálvari yvirtøkuni.

Hví megnar ein sokallað loysingarsamgonga ikki fleiri yvirtøkur? Svarið má verða handalag ella mangul uppá sama. Vilji skuldi so ikki manglað.

Samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin frá 1974 til 1980 yvirtók umsitingina av skúlaverkinum, almannaverkinum, yvirtók Postverkið, stovnsetti V&B, flutti sjómarkið út á 200 fjórðingar o.s.fr. So kom stígur í tey árini Sambandsflokkruin hevði Løgmann. Í samgonguni, sum so kom millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og smáu flokkarnar, var blokkstuðulsskipanin innførd. Hendan skipan, ið var samtykt í 1988 var eitt risaframstig í mun til gomlu refusiónsskipanina.

So kom kreppan, og síðani er millum lítið og einki hent á sjálvstýrisleið. Nú er nokk hugsað, og tíð er at handla! Føroya fólk vil yvirtøkur, hóast flestu føroyingar ikki vilja loysing. Lat okkum gera tað, vit eru samd um, og so kjakast um rest, tá tað verður aktuelt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Søguligur dagur fyri tey sálarsjúku

**Svenning av Loft**
*formaður*



Týsdagurin 8. apríl var ein søgurligur dagur fyri tey sálarsjúku, teirra kæru og øll tey, ið eru um tey sálarsjúku, og hava gjørt eitt megnararbeiði fyri hendan partin av samfelagsborgarum okkara.

Tað var sera hugaligt at sita í tinginum hendan dagin og lýða á tað, ið tingfólk høvdu at siga. Umboðini fyri allar flokkarnar vóru sera vælviljað fyri hesum uppskotinum um heildarpsykiatri, sum Bill Justinussen legði fram á tingborð hendan dagin.

Hetta er fyrstu ferð at eitt so umfatandi ált er komið á løgtingsborð. Hetta skal landsstýrismaðurin, Bill Justinussen, hava eina hjartans tøkk fyri. Hann hevur eisini boðað frá, at tað fer ikki at ganga long tíð áðrenn tey fyrstu lógaruppskotini til frama fyri tey psykisk sjúku fara at verða løgd fyri tingið til samtyktar - og tað gleða vit okkum til.

Vit fara eisini at takka teim tinglimum, sum í farnum árum hava havt viðurskifti teirra sálarsjúku á hjarta og reist fyrispurningar til landsstýrismenninar á økinum. Hetta hevur ikki verið til einkis.

Tvey valaálit eru seinastu árini løgd fyri landsstýrismenninar á økinum, umframt onnur frammanundan. Annað av teim seinnu álitunum bar heitið “Ein glotti fyri framman”. Sinnisbati hómar nú ein glotta fyri framman, við tað at nevnda álitið um heildarpsykiatri er lagt fyri tingið til umrøðu. Tí gleða vit at okkum til at tey fyrstu ítøkiligu uppskotini fara at verða løgd fram á tingborð til samtyktar.

Vit fara at minna á, at størstur er tørvurin fyri bústøðum til tey sálarsjúku. Hetta má raðfestast fremst, saman við virknismøguleikum fyri tey sálarsjúku. Tí var spell, at sosialpsykiatrii-ætlanin ikki varð løgd fram á hesum sinni. Tað hevur sína serstøku orsøk. Men hesin parturin eigur at verða lagdur fram á ting so skjótt sum greiði er fingin á umsitingarliga spurningin-um millum Páll á Reynatúgvu og Bill Justinussen. Sum skilst so er ætlanin, at Bill Justinussen í framtíðini fer at umsita alt økið, ið hevur við sálarsjúk at gera, og tað jú eisini tað einasta rætta, at alt psykiatriska økið er undir einum og sama landsstýrismanni.

# Samferðsluhavn á Trongisvágsfirði

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Kanningar vísa, at hon verður ikki nýtulig í 48 dagar um ári uttan pier, er tað hetta løgtingsmenn og suðuroyingar ynskja?

Eftir eina langa burðartíð er vinnunevndin loksins barsla við einum meirluta áliti, sum løgtingið skal taka støðu til.

Ístaðin fyri at halda tingini sundurskild, hevur vinnunevndin forbrongla málið, við at blanda havnaútbygging og tunnilsger saman, við tí fylgju, at tá ið nýtt strandfaraskip kemur til landið hevur tað ikki nakað atløgupláss í Suðuroy.

Málið er annars heilt greitt, tí uppskot til løgtingslóg sigur, at landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri, at samferðsluhavn við landgongd og farstøð verður bygd eystan fyri Drelnes á Trongisvágsfyri. Byggiútreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi vera 60 mió kr.Bert fólkafloksumboði tekur undir við, at samtykkja hetta uppskoti uttan broytingar.

Gróttøka til havnaútbygging kann fáast frá tunlum oman fyri havnarlagið á Drelnesi ella keypast frá einum ljótum gróttbroti.

At allir suðuroyingar taka undir við seinra uppskotinum um tunnilsloysn Øravík -Hov er ein sjálvfylgja og tað skuldi heldur ikki verði nakar trupuleiki fyri løgtingsmenn, at tikið undir við hesum uppskoti, tí tað er bæði bíligari og betri. Tað er heldur eingin orsøk til, at gróti frá hesari tunnil skal goymast, tí allar kommunurnar í Suðuroy eru ivalest áhugaðar í at fáa fatur á hesum tilfari.

Í álitinum stendur eisini, at fyrst spara teir 15 mió kr. uppá havnaútbygging og síðani 30 mió kr uppá tunnilsgerð, íalt 45 mió kr. Skulu hesar 45 mió kr. brúkast í Suðuroy ? t.d tunnil til Fámjin umleið 20 mió kr og 25 mió til breiðkan av tunnil til Hvalba?

Livst so spyrst.

# Viðvíkjandi: Vegskattaeftirstøðu fyri fyrra hálvár 2003

**BILEFTIRLIT FØROYA**

Bileftirlitið hevur í dag latið politistøðunum kring landið 377 mál um vegskattaeftirstøður, til at taka nummarspjøldrini av akførum, sum enn ikki hava goldið vegskatt fyri fyrra hálvár 2003.

Kann bileigarin ikki vísa fram kvittan fyri goldna vegskattaeftirstøðu, verða nummarspjøldrini tikin av bilinum.

Hetta til kunnleika.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Aftursvar til Jenis viðvíkjandi seksualundirvísing í skúlanum

**Jóhan á Plógv**

Góði Jenis av Rana

Eg haldið at tað er ræðandi, um tú nú fert at blanda teg í, um hvat fyri tilfar verður brúkt í skúlanum um kynslív. Ræðandi, tí at Føroya fólk kennir tína áskoðan, tá talan er bæði um kynslív og samkynt. Eg ivist onga løtu í, at tú meinar tað besta, men tíðanniverri eru tínir tankar stýrdir av átrúnarligum morali, sum als ikki er nútíðar hóskandi, og sum børn, sum sleppa at vera børn, als ikki skilja.

Eg skilji á Jenisi, at mong foreldur eru ólukkulig av tí seksualundurvísing, sum børn teirra læra um í skúlanum. Nú havi eg ikki haft ta æru at sæð hesar báðar filmarnar, men eg skilji á Jenisi, at teir ikki eru bygdir upp á somu mentan, sum vit føroyingar hava. Mær vitandi eru kynsliminir líka á øllum menniskjum, óansæð um tey hoyra til eina aðra mentan ella trúgv. Kynsdriftirnar eru akkurát tær somu, sum teir syndugu danskarnir stríðast við. Eg eri tó samdur við tær í, at sýna filmar við kynsligari samlegu er ikki hóskandi fyri børnum í 7 klassa. Rætt skal vera rætt.

Eg haldi at seksualundirvísing í skúlanum skuldi verið ein lærugrein á jøvnum støði við allar aðrar lærugreinir. Man byrjar at tosa um kenslur, hjartasorg, happing, tað at vera drongur, tað at vera genta og viðurskiftini millum kynini. Tað at vera ungur og finna sær eitt standistað í tí forvirraðu verð, sum ung skulu ígjøgnum, fyri at finna sær ein samleika. Stigvíst fert tú so víðari og undirvísir í tilfari, sum hóskar til aldur teirra. Tað ræður um at fáa eitt kjak millum kynini, soleiðis at tey fáa at vita frá hvørjum øðrum, at í veruleikanum er tað sjarma, virðing sínámillum, humør, fittur, persónligheit, tað at man svingar væl saman, sum telur, altso innari virðir og ikki bert tey uttaru. Hetta vil eisini verða ein stórur lætti hjá teimum, sum generelt eru undir hørðum trýsti fyri at síggja gott út, harav er ein stórur partur bangin fyri ikki at fáa ein sheik ella damu, tí tey ikki líkast fotomodellum. Eg haldi, at man skal taka gestalærarar til hesar lærugreinirnar, tí at tað vísir seg, at børnini opna seg meira fyri einum persóni, sum tey ikki kenna frá øðrum viðurskiftum.

# Páskir - Tað er fullgjørt

**Kjartan Stakksund**



Teir tóku nú Jesus; og hann bar sjálvur kross sín og gekk út á tann staðin, sum kallaðist Ennistaðurin, og suiim á hebraiskum eitur Golgata. Har krossfestu teir hann og saman við honum tveir aðrar, ein hvørjumegin, men Jesus í miðjuni. Men Pilatus skrivaði eisini eina yvirskrift og setti hana á krossin; har stóða skrivað: »Jesus úr Nasaret, kongur jødanna«. Hesa yvirskriftina lósu nú mangir av jødunum, tí at staðurin, har sum Jesus varð krossfestur, var nær við bygdina, og hon var skrivað á hebraiskum og rómverskum og grikskum máli. Tá søgdu høvuðsprestar jødanna við Pilatus: »Skrivað ikki: Kongur jødanna; men: Hann segði: Eg eri kongur jødanna«. Pilatus svaraði: »Tað, sum eg havi skrivað, havi eg skrivað.« Tá ið nú hermenninir høvdu krossfest Jesus, tóku teir klæði hansara og býttu tey sundur í fýra lutir, hvørjum hermanni ein lut, somuleiðis kyrtilin; men kyrtilin var óseymaður, vovin í einum oman igjøgnum. Teir søgdu tí hvør við annan: »Latum okkum ikki sera hann sundur, men latum okkum heldur kasta lut um hann, hvør ið skal fáa hann;« tí at skriftin skuldi ganga út: »Teir býttu klæði míni millum sín, og kastaðu lut um klædning mín.« Hetta gjørdu nú hermenninir. Men við Jesu kross stóð móðir hansara og móðursystir hansara, Maria, kona Kleopasar, og Maria Magdalena. Tá ið nú Jesus sá móður sína og lærusveinin, sum hann elskaði, standa har, sigur hann við móður sína: »Kvinna, har er sonur tín!« Síðan sigur hann við lærusveinin: »Sí, har er móður tínn!« Og frá teirri stund tók lærusveinurin hana heim til sín. Eftir hetta, tá ið Jesus visti, at alt nú longu var fullgjørt, til tess at skriftin skuldi ganga út, sigur hann: »Eg eri tystur.« Har stóð eitt ker fult av edikki. Teir settu tá ein svamp fullan av edikki á ein ýsopslegg og bóru honum at munni. Tá ið Jesus nú hevði fingið edikkin, segði hann: »Tað er fullgjørt!« Og hann boygdi høvdið og gav upp andan. Jóhs. 19, 17-30.

Vit hava nú aftur einaferð enn gingið ígjøgnum Jesu pínslusøgu í føstuni, hvat sigur hetta okkum í dag, at Jesus mátti ígjøgnum hesa ómenniskjaligu líðing fyri at bjarga okkum frelst heim í Guds æviga ríki, var tað eingin annar útvegur? Hendan spurning hava mong menniskju sett sær sjálvum, hetta prógvar bara Guds undurfulla kærleika til mannaættina, sum var sett uttanfyri Paradís, vegna syndafallið; tí er tað at vit ongantíð koma uttan um Jesus, hann er einasti møguleiki fyri at koma inn í Guds ríki ein dag.

Tað verður ofta sagt at tað vóru ikki naglarnir sum negldir vóru ígjøgnum hendur og føtur frelsarans hin dagin á Golgata, men tað var Guds undurfulli kærleiki til ta falnu mannaætt, sum bant frelsaran til krossin, og tað er so satt sum tað er sagt. Jesus var sendur til jarðar fyri at fremja faðirsins vilja, og tað var at bjarga okkum inn aftur til Guds, sum vit vegna syndafalli vóru rikin frá honum, men nú hevur Gud givið menniskjum hendan møguleikan at koma aftur til Guds; o, tann veldigi kærleiki Gud hevur til okkum menniskju, at hann lat sín einborna son fara inn í líðing og deyða fyri at vit skuldu verða bjargað undan Satans og deyðans mátti.

Gud havi lov fyri at Jesus ikki var liggjandi í grøvini, men sprogdi deyðans leinkjur fyri at vit menniskju skuldu liva, men tá ið tað er sagt so skal tað heldur ikki dyljast, at vit koma ongantíð uttanum Jesus, vit koma altíð at standa yvir fyri einum valið í lívinum, annaðhvørt velja vit Jesus og eiga tað æviga lívið saman við Jesusi longu her og nú, og síðani heima í Guds ríki, ella vraka vit hann og mega glatast, tað verður okkara avgerð. Tilboðið er gladandi í náðitíðini, tað vil siga frá vøggu í grøv, tá foldarlívið er farið, er allur møguleikið farin.

Tá tað er sagt, at allur møguleiki er farin tá lívið er at enda komið, so skal tað eisini sigast at so leingi vit liva foldarlív okkara her, so leingi hava vit hendan møguleikan. Jesus stendur við okkara hjartadyr og bankar, hann vil so gjarna koma inn og geva okkum eina livandi vón, sum ber ígjøgnum hetta foldarlív, ja, líka inn í ævinleikan. Kunnu vit taka undir við Pæturi ápostli, tá ið hann sigur: Lovaður verði Gud og faðir várs Harra Jesu Krists, sum eftir miklu miskunn síni hevur endurføtt okkum til livandi vónar fyri uppreisn Jesu Krists frá deyðum, til ein óforgongiligan og óspilluligan og ófølnandi arv, sum er goymdur í himlunum til tykkara, – tit sum við Guds kraft verða varðveittir við trúnni til ta frelsu, sum er liðug at verða opinberað í teirri síðstu tíðini, sum tit skulu fegnast um, tó at tit nú eina skamma stund, um so skal vera, kenna harm í mongum ymsum royndum, fyri at tykkara roynda trúgv, sum er nógv dýrmætari enn hitt forgongiliga gullið, sum tó verður roynt í eldi, má verða funnin til lovs og dýrdar og heiðurs í opinbering Jesu Krists, hann, sum tit ikki hava sæð, men tó elska, hann, sum tit, tó at tit ikki nú hava hann fyri eygum tykkara, tó trúgva á, skulu fegnast um við ósigiligari og dýrmettari gleði, tá ið tit náa málið fyri trúgv tykkara, frelsu sálanna. 1. Pæt. 1, 3-9.

Eiga vit hesa livandi vónina so fáa vit eisini einar gleðiligar páskir. So vil eg ynskja øllum einar gleðiliga páskir í Jesu navni við hesum páskasálinum, sum eg havi yrkt til hesar páskirnar:

### Páskasálmur

*Lag:* Gakk undir Jesu kross at stá. Bf. 64, Dk. 438, Gfs. 5

1. Við Golgata eg friðin fann,
har blóð Guds sonar niður rann;
tað burtur mínar syndir tvóð,
hans náði móti mær er góð.

2. Tað svárt var har á Golgata,
tí øll mín synd á Jesus lá;
hann negldur var á krossins træ,
og fyri fíggindum hann bað.

3. Tín pínsla, deyði fyri meg,
er bjarging mín á smala veg;
tí prísi eg hans navni her,
sum frelsti meg í óndu verð.

4. O, Jesus góði, lær meg sjá,
teg hangandi á Golgata;
í grøvina tú lagdur var,
tí at tú mínar syndir bar.

5. Úr grøvini tú tó upp stóð,
tá runnið hevði alt títt blóð;
sum hvørja sál her tváa kann,
tú sigur yvir deyða vann.

6. Mín vón í dag er sigur tín,
tí ert tú Jesus frelsa mín;
tú lekti míni syndasár,
í míni sál er ævigt vár.

# Listaframsýning í miðbýnum í Havn

Hósdagin, 10. apríl 2003 kl. 16.00, letur Absalon Hansen upp myndaframsýning á torginum í Snarskivuni.

Snarskivan, ið er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu, húsast saman við postavgreiðsluni í gamla posthúsbygninginum í miðbýnum. Hugnaliga forhøllin, nevnd Torgið, verður eisini brúkt til framsýningar, sum mentamáladeildin skipar fyri.

Síðani Snarskivan læt upp, hava skiftandi framsýningar verið á Torginum, har føroysk listafólk hava sýnt fram, og nú er Torgið karmur um eina framsýning hjá Absalon Hansen. Talan er um fotomyndir av føroyskum landsløgum.

Framsýningin verður hangandi til miðan mai.

Høvi er at síggja framsýningina, tá ið opið er í snarskivuni, mánadag-fríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18.